# Guðrun í Focus




*Hesin Ford Focus hjá P/F Wenzel í Havn flutti Guðrun vestur á flogvøllin. Hann flytir hana eisini heimaftur á Tvøroyri, tá hon kemur aftur. Stjørna ella ikki stjørna. Hon hevur longu vunnið so nógv, sigur Peter S. Petersen, stjóri hjá P/F Wenzel, føroyska Ford-umboðnum*

**Ein Ford Focus bíðaði Guðrun, tá hon fríggjamorgunin kom til Havnar við Smyrli. Guðrun er í fokus, men nú kann hon eisini koyra í Focus, sigur Peter S. Petersen, stjóri hjá bilasøluni P/F Wenzel í Havn**

STJØRNAN
*Eirikur Lindenskov*

Guðrun Sólja Jacobsen er rættuliga komin í fokus við luttøku síni í sendingini Stjerne for en aften. Hetta helt Peter Smidt Petersen, stjóri hjá P/F Wenzel, ikki kundi fara aftur við borðinum uttan víðar, so tá Guðrun kom norður til Havnar við Smyrli í morgun, stóð ein Ford Focus við búmerkinum »Stjerne for en aften« og bíðaði henni.

Soleiðis kom Guðrun úr Havn vestur á flogvøllin í morgun í hesum eyðkenda Ford Focus frá Wenzel í Havn.

– Bilurin stendur og bíðar henni, tá hon kemur aftur eftir finaluna næsta vikuskifti, og vit syrgja fyri flutninginum suður aftur á Tvøroyri – um hon so vinnur ella ikki, sigur Peter S. Petersen, sum leggur afturat, at Guðrun longu hevur vunnið sera nógv.

Tað verður ein fullsettur salur í Forum í Keypmannahavn komandi fríggjakvøld, tá finalan verður.

Frá »E-Billetter« í Keypmannahavn, sum umsita atgongumerkjasøluna, frætta vit, at tað longu er útselt. Har sleppa 5.000 fólk inn, so áhugin er sera stórur. Ivaleyst verða tað milliónir av hyggjarum, sum fara at fylgja við, tá Guðrun fer á pallin, og so er bert at vóna, at hon – allarhelst – við sanginum» Promise Me«, eins væl hugtekur fjøldina, so hon kann kjósast stjørna.




## Tøkk

Ein hjartans tøkk til tykkum,
sum á ymiskan hátt vóru við
til at gera mín 80 ára føðingardag,
so hugnaligan og ógloymandi.

Tøkk til allar hjálpandi hendur.
Tøkk til Leif Sørensen, sum
fyrimyndarliga stóð fyri matinum.

Tøkk øll somul.

**Poul Johs. Johansen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, ið var sýnt okkum, tá ið okkara góði maður, pápi, verfarðir, beiggi, abbi og langabbi

**Georg J.F. Thorsteinsson**

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Takk tit mongu, sum vitjaðu hann og vóru um hann í heiminum, tá hann lá sjúkur.
Takk til Sølva W. Olsen, lækna, heimasjúkrasystrar og heimahjálparar, sum gjørdu so nógv fyri hann.
Takk til Hera Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð í heiminum, í kapellinum og í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar og til Ólav av Váli fyri vakra sangin í kirkjuni. Takk tit mongu, sum hjálptu til við ymiskum bæði tá hann lá sjúkur og til jarðarferðina.
Takk fyri kransar, blómur og gávur til sunnudagsskúlaarbeiðið í Meinigheitshúsinum.
Takk til sangarar og til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Hjartans tøkk øll somul*

**Marita, Hans Arni, Kári, Sidsel, Heri, Randi og Thordur við familjum**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 85 ára føðingardegnum takki eg hjartaliga.

Heilsan
**Margretha Hansen, Saltnes**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, nær og fjar, sum mintust meg á 80 ára føðingardegnum hin 11. mars 2003.

Tøkk fyri blómur, heilsanir, fjarrit, telefonheilsanir og vitjanir.

Øll góð ynskir frá
**Trygva Árting**




# Floksfelagarnir eru mínir bestu stuðlar

**Í gjár fór Guðrun Sólja Jacobsen til Danmarkar. Í dag framføra stjørnurnar frá "Stjerne for en aften" ymsastaðni og seinni fara tey á eitt frítíðarstað at hava tað gott og koma hvørjum ørðum við**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*Floksfelagarnir eru mínir størstu og bestu stuðlar, sigur Guðrun Jacobsen, sum í gjár aftur fór til Danmarkar at taka lut í ymsum í samband við Stjerne for en aften*

*Mynd: D. Olsen*

Guðrun Sólja Jacobsen er við eitt vorðin navnið, sum øll hava á munni. Í gjár fór hon aftur niður til Danmarkar og ferðirnar hava verið nógvar aftur og fram, síðani fyrstu luttøkuna í "Stjerne for en aften", har Guðrun eigur pláss í finaluni. Í dag eru framførslur og síðani skal finaluliðið ristast saman, og tað verður gjørt við at vitja eitt frítíðarstað. Guðrun verður so verðandi í Danmark komandi viku, tá stóra finalan í "Stjerne for en aften" verður, og finnast skal útav, hvør skal gerast stjørna í meira enn eitt kvøld.

Sosialurin hitti Guðruna hósdagin á Miðnámsskúlanum í Suðuroynni. Í gongini síggjast útklipp og myndir við Guðruni hanga á uppslagtalvum, men annars angar av friði og gerandisdegi.

- Floksfelagarnir eru mínir størstu og bestu stuðlar, sigur Guðrun skemtandi, men eygnabráið sigur, at ein farri av álvara er í.

Guðrun metir avgjørt, at har eru aðrir luttakarar, sum kunnu gera seg galdandi í kappingini, hon nevnir millum onnur Tarek og Kendru. Men hóast stóra mótstøðu, so eru góðar vónir, og ein troyst er, at nummar 2 og 3 fáa eisini eitt sindur burturúr.

- Flokkurin tekur tað heilt roliga, sigur Guðrun, meðan vit taka myndir, men heitasta navnið á føroyska stjørnuhválvinum fær ikki heilt loyvi at gloyma, at hon er stjørna.

Tað er telefon, ein drongur úr...., sigur ein floksfelagi, og kemur rennandi við fartelefonini hjá Guðruni, sum ovfarin prátar við fjepparan.

Guðrun hevur verið í Danmark fyri at syngja inn lagið "Promise Me" á fløgu, har allir undanvinnararnir eru við. Tónleikurin er hin sami, og áskoðarafjøldin, men hóast live kensluna, so er røddin sungin inn umaftur. Fløgan kom út í vikuni.

Guðrun er nógv umbiðin sangfuglur til ymisk tiltøk kring landið. Hon hevur verið, og er, limur í hornorkestrinum á Tvøroyri og í Suðuroyar Gospelkórið, sum framførur um vikuskiftið, men hesaferð uttan Guðruna, sum knappliga er umbiðin úr øllum ættum.

Myndatøkan er liðug og tað er fríkorterið eisini, men fjepparin í telefonini er ikki liðugur. Vit biða farvæl og ynskja tað besta og Guðrun er blíð og spent, har hon stendur við telefonini og í føroyskum nýggjum og snøggum jakka, tað er Sirri, sum hevur latið henni plaggið.

# Elis er serkønur dómari

**Verturin í dansiband sendingini í ÚF, "Hvat Nú?", eitur Elis Poulsen. Og hannn hevur nú fingið eina rættiliga viðurkenning, tí hann er kosin at sita í fakdómsnevndini, sum skal kjósa ársins dansiband í Noreg og hetta er ikki hissini heiður**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Síðani Elis Poulsen, útvarpsmaður, fór undir sendingina "Hvat Nú?", er hann komin í ein serstakan heim, nevnliga dansiband heimin, og tað hevur gingið við ferð.

Heimasíðan hjá sendingini er væl vitjað úr øllum norðurlondum og bólkar senda fløgur, fyri at verða við á føroyska dansitopplistanum.

## Dómaraheiður

Men at tað ikki bara hevur gingið skjótt, men eisini væl, at fáa viðurkenning og koma langt í dansibad heiminum, hevur Elis nú prógv fyri.

Hann er biðin til serkønan dómara, nú ársins dansiband skal kjósast í Noreg. Hetta er ikki hissini heiður, tí ársins dansiband svarar til kendu heiðursgávuna Music Awards.

- Hetta er størsti heiðurin innan dansiband tónleikin, og áður hava bólkar sum Ole Ivars fingið heiðurin, sigur Elis Poulsen, og nevnir, at teir sum fingu heiðurin í fjør, hóast heldur ókendir, rættiliga fingu vind í seglini.

- Eini 60 løg eru í ár at velja í. Sett eru dómsnevnd og seinni ein faknevnd, og at enda eru 8 løg, sum lurtarar eisini sleppa at siga sína hugsan um, so fólkið eigur eisini avgerðandi leiklut, sigur Elis, sum situr í faknevndini og sum leggur dent á, at hann hevur lurtað og tikið støðu og avgreitt sín leiklut.




## Kann ikki koma longur

Elis og sendingin Hvat Nú? eru eftir stuttari tíð vorðin viðurkend innan dansibandheimin og hava fingið viðurkenning. Elis hevur eisini verið í útlondum í samband við dansibandfestivalir og m.a. hevur hann í fjør handað Føroyska Tónleikahornið til Ole Ivars, eitt føroyskt framleitt tónahorn, sum Torgerð Suðuroy tilevnaði. Ætlanir eru um at fara undir aftur tónahorntiltakið í ár, sigur Elis. Hornið verður latið til mest spælda bólk í árinum.

At koma í slíka faknevnd er stórur heiður. Eg kann iki koma nógv longur inan dansibandheimin, sigur Elis um dómaraheitið, og hann fegnast um álitið, sum víst er honum.

- Heimasíðan er broytt og tað hevur eisini gjørt góðan mun og hevur bøtt um viðurskiftini við dansibandheimin 1000 ferðir, hóast tey altíð vóru góð, sigur Elis, sum fyrstu tíðina eftir broytingina fekk eini hálvthundrað heilsanir dagliga úr øllum Norðanlondum.

- Fólk duga at síggja, at her er nakað bygt upp og tað verður virðismett, sigur ein fegin útvarpsvertur.

- Eg havi fingið nógvar persónligar vinir innan dansibandheimin, eri so at siga komin inn í hjartað, og kann ikki koma nógv longur, sigur Elis, sum eisini fegnast um samstarvið aðrar programleiðarar.

- Tað er høgt mett arbeiðið, ið er gjørt, og tað er eisini ÚF, sum hervið fær eitt herðaklapp, sigur Elis, sum á ferð kring landið og í prátið við lurtarar væl merkir, at lurtaratalið hjá Hvat Nú? er vaksandi.

- Eg kann ikki koma nógv longur, meti eg, men eg kann halda stásið viðlíka, sigur Elis, sum fegnast um at hava eitt arbeiði, sum eisini er ítriv, og sum bæði hann og konan hava gleði av, og at ein so stórur heiður, sum at verða nevndur til serkønan dómara so eisini fylgir við, tað staðfestir bert støðuna hjá føroyska dansiband vertinum.

- Eg kann bert vóna at sleppa at halda fram við hesum, tey árini eg havi eftir í arbeiðinum, sigur ein fegin útvarpsvertur, sum eisini avdúkar, at fleiri góð nøvn eru væntandi til Føroya í næstum, so dansibandhugað kunnu pussa skógvarnar og gleða seg.

Men meðan bíðað verður, ber til at lurta eftir Hvat Nú?.